*–Vit ætla at brúka kjarnorkuna til elframleiðslu, men verða vitt hótt, er støðan ein onnur*

*Ali Larijani*

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK



# Spenningur millum Iran og Ísrael elvir til ótta í Miðeystri




*Ali Larijani, sum er leiðari fyri iransku kjarnorkuverkætlanini, ávarar nú fíggindar Irans.*

**Viðurskiftini millum Iran og Ísrael versnaðu um vikuskiftið. Enn er talan um hóttanir, men londini nærkast samanbresti**

Støðan í Miðeystri er versnað nógv teir seinastu dagarnar, og í fleiri londum stúra fólk fyri, hvat kann henda.

Fyrst boðaði leiðarin fyri iransku kjarnorkuverkætlanini, Ali Larijani, frá, at Iran fer at brúka sína kjarnorkutøkni til hernaðarlig endamál, verður landið hótt uttaneftir. Á vitjan í Beijing segði hann, at sum er ætlar Iran at brúka kjarnorkuna til elframleiðslu.

- Men verða vit hótt, verður støðan ein onnur, legði hann afturat.

Minni enn eitt samdøgur seinni skrivaði bretska blaðið Sunday Times, at tvær deildir hjá ísraelska flogvápninum eru farnar undir venjingar við tí endamáli at søkja at trimum kjarnorkuverkum í Iran. Blaðið visti at siga, at talan er um verkini í Natanz, Isfahran og Arak, og at ísraelska flogvápnið ætlar at tveita smáar kjarnorkubumbur niður yvir verkini.

Talsmaðurin hjá ísraelska uttanríkisráðnum, Mark Regev, vildi ikki gera beinleiðis viðmerkingar til tíðindini í Sunday Times. Hann segði, at Ísrael styðjar tær diplomatisku royndirnar at fáa Iran at gevast við sínum kjarnorkuverkætlanum. Ísrael hevur fyrr gjørt greitt, at landið fer ikki at góðtaka, at Iran fær kjarnorkuvápn.

Tað er ikki bara Ísrael, sum er ímóti, at Iran fær kjarnorkuvápn. Tey smáu londini við Persaflógvan, Kuwait, Qatar og Bahrein, stúra eisini fyri, hvat so kann henda. USA hevur hermenn í øllum trimum londunum, og tí stúra tey fyri iranskum hevndarálopum, tí tað er greitt, at Ísrael fer ikki at søkja at Iran uttan tilsøgn úr USA.

# – Eg hevði ikki kunnað dripið tær

**Bretska løgreglan hevur skuldsett Steven Wright fyri at hava beint fyri fimm kvinnum í Ipswich, men sjálvur sigur hann, at hann kann ikki drepa nakran**



*Tær fimm myrdu kvinnurnar. F.v. Gemma Adams (25), Tania Nicol (19), Amaeli Alderton (24), Paula Channell (24) og Annette Nicholls (29).*

- Tú mást trúgva mær, góða. Eg hevði ikki kunnað framt hesi ræðuligu lógarbrotini, skrivar tann 48 ára gamli Steven Wright í brævi til unnustuna Pam Goodman. Blaðið News Of The World hevur fingið hendur á brævinum og endurgav úr tí í gjár.

Í brævinum sigur Steven Wright seg vóna, at tað, sum er hent, er bara ein óndur dreymur.

- Tú skalt ikki stúra, tí eg eri sálarliga og likamliga sterkari, enn tú kanska heldur, skrivar hann.

Steven Wright er er úr Ipswich, har hann varð tikin tann 19. desember. Eftir kravi frá løgregluni har skal hann sita í varðhaldi til tann 1. mai, so løgreglan fær stundir til at kanna, um tað var hann, sum myrdi tær fimm kvinnurnar. Sambært løgregluni bleiv tann fyrsta kvinnan myrd síðst í oktober og tann seinasta um hálvan desember.

## STUTT SAGT

### Formansstríð

Fyrrverandi ísraelski forsætisráðharrin Ehud Barak umhugsar nú at fara aftur upp í politikk. Í hvussu er hevur hann boðað frá, at hann ætlar sær at royna at fáa formansstarvið í Arbeiðaraflokkinum aftur. Í løtuni er Amir Perez formaður í flokkinum. Hann er verjumálaráðharri í samgongustjórnini, og hansara umdømi er versnað munandi síðanbi kríggið millum Ísrael og Hizbollah. Ehud Barak, sum er fyrrverandi generalur í ísraelska herinum, legði í sínari forsætisráðharratíð stóran dent á at fáa frið við palestinar. Samráðingarnar slitnaðu kortini í 2000, og árið eftir tapti Barak tjóðartingsvalið til Ariel Sharon. Aftan á ósigurin tók Barak seg burtur úr politikki, men nú ætlar hann so at royna aftur.

### Grashoppuálop

Grashoppur í hundraðtúsundatali herja í hesum døgum stór landbúnaðarøkir í Yucatán í landssynningspartinum av Meksiko, og vandi er fyri, at tann átifreki gesturin fer at oyðileggja nógva grøði hjá bøndrunum. Grashoppur kunnu verða uppi í einar tíggju sentimetrar til longdar, og tá taka seg saman, er tað sum at síggja eitt fleiri kilometrar breitt skýggj, sigur ein talsmaður fyri meksikonsku myndugleikarnar. Hetta er ikki fyrstu ferð, at grashoppur gera um seg í Meksiko. Í fjør oyðiløgdu tær nógva grøði norðan fyri Yucatán.

### Regn í Brasil

Áhaldandi regn hevur elvt til fleiri skriðulop í Brasil teir seinastu dagarnar, og sambært myndugleikunum hava minst 31 fólk latið lív. Ringast stendur til í landspartinum Rio de Janeiro. Meiri enn 12.000 fólk eru flýdd heiman orsakað av vandanum fyri skriðulopum, og ty halda nú til í kirkjum, skúlum og øðrum stórum bygningum. Veðurmenninir hava boðað frá meiri regni.